aðarflokkinum bert við tí muni, at hjá Fólkaflokkinum eru tað borgarligu veljararnir, sum flyta til Sambandið, sigur Dennis Holm.

Hann heldur, at orsøkin til at Sambandsflokkurin tekur so nógv frá Javnaðinum og Fólkaflokkinum er, at tað er minst ófriður har.

- Tað er meiri hetta enn nakað ítøkiligt, sum Sambandsflokkurin hevur gjørt, sum hevur ført til framgongdina, sigur Dennis Holm.

Veljarakanningin vísir annars, at Sambandsflokkurin gongur nágreiniliga líka nógv fram, sum Fólkaflokkurin og Javnaðarflokkurin ganga aftur til samans, og tað hevur samstundis ført til, at Sambandsflokkurin í veljarakanningini er størri enn Fólkaflokkurin og Javnaðarflokkurin tilsamans.

### Ikki val nú

Hendan veljarakanningin vísir, at Sambandsflokkurin er tvær og eina hálva ferð so stórur sum Javnaðarflokkurin, og næstan tvífalt so stórur sum Fólkaflokkurin.

- Spurningurin er so, um hetta merkir eina grundleggjandi broyting innan føroyskan politikk, har vit fara frá at hava fýra rímiliga líka stórar flokkar og tveir smáar, til at hava tveir stórar, tveir miðalstórar og tveir smáar, sigur Dennis Holm.

Hettar skapar eisini møguleikar fyri nýggjum samansetningum í føroyskum politikki og reisir spurningin, hvussu styrkissamansetingin verður.

Hinvegin er ilt at meta um, antin hetta verður støðan til eitt komandi val.

- Veljarakanningin gevur greiðar ábendingar um, hvussu politiska støðan er nú, men tað er long tíð til januar 2012, og nógv kann henda áðrenn tað. Eitt nú skulu fíggjarkarmarnir fyri 2012 leggjast í vár, og tað gevur greiðar ábendingar um, hvønn politikk, flokkarnir ætla sær at føra, sigur Dennis Holm.

Hann væntar ikki, at val verður nú, men hinvegin heldur hann, at várið verður turbulent.

- Fíggjarlógarviðgerðin er jú flutt frá um heystið til um várið, og tað verður uttan iva ein tungur burður at fáa fíggjarlógina upp á pláss, metir Dennis Holm.

Hendan veljarakanningin er gjørd á tann hátt, at ávísar teldupost adressur eru útvaldar, síðani hevur teldupostegarin fingið eina leinkju sendandi, har hann kann fara inn av svara spurningum. Hetta er bert møguligt at gera einaferð, og hendan møguleikan at svara hava 434 veljarar nýtt.

### Hvagani koma veljararnir? - Ella: Hvør fær frá hvørjum?

| Atkvøddi á vali 2008 | % Atkvøtt í dag | | | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| | Fólkafl. | Sambandsfl. | Javnaðarfl. | Sjálvst.fl. | Tjóðveldi | Miðfl. | Blankt | Ikki á val | Veit ikki |
| *Fólkaflokkurin* | **73** | 9 | 2 | 10 | 3 | 4 | 34 | 8 | 19 |
| *Sambandsflokkurin* | 4 | **71** | 0 | 0 | 0 | 0 | 3 | 0 | 8 |
| *Javnaðarflokkurin* | 4 | 13 | **91** | 10 | 3 | 8 | 25 | 23 | 15 |
| *Sjálvstýrisflokkurin* | 4 | 2 | 2 | **62** | 1 | 0 | 6 | 8 | 5 |
| *Tjóðveldi* | 2 | 1 | 0 | 5 | **85** | 0 | 22 | 8 | 27 |
| *Miðflokkurin* | 8 | 0 | 0 | 0 | 3 | **77** | 0 | 8 | 8 |
| *Miðnámsflokkurin* | 2 | 2 | 0 | 5 | 0 | 4 | 0 | 0 | 0 |
| *Blankt* | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | 3 | 0 | 0 |
| *Var ikki á vali* | 0 | 1 | 0 | 5 | 1 | 4 | 6 | 38 | 12 |
| *Hevði ikki valrætt* | 2 | 0 | 4 | 5 | 3 | 4 | 0 | 8 | 5 |
| *Tils.* | 100 | 100 | 100 | 100 | 100 | 100 | 100 | 100 | 100 |
| N= | 49 | 85 | 47 | 21 | 96 | 26 | 32 | 13 | 59 |

## Eidesgaard:
# Vit fáa skyldina

**VELJARAKANNING** Tað sær út til, at Javnaðarflokkurin fær skyldina fyri tær negativu søgurnar, sum ABC samgongan stendur fyri, meðan hinir flokkarnir skora uppá tær positivu søgurnar, sigur Jóannes Eidesgaard

Barbara Holm

Beint fyri evsta mark eydnaðist tað Sosialinum at fáa orðið á Jóannes Eidesgaard, sum ikki er serstakliga fegin um nýggjastu veljarakanningina.

Jóannes Eidesgaard er sannførdur um, at Javnaðarflokkurin verður revsaður av veljarunum, tá ið illa stendur til í samfelagnum.

– Tað sær út til, at veljarin væntar okkum at verða garantur fyri vælferðina í samfelagnum, og tá sparingar mugu gerast, so er tað vit sum verða revsað, sigur Jóannes Eidesgaard.

Hann heldur, at samgongusamstarvið við tveir borgarligar flokkar hevur skatt flokkin.

– Eg haldi sjálvur, at vit í landsstýrinum gera eitt gott arbeiði, men vit megna kanska ikki at føra nóg sterkan sosialpolitikk við tveimum borgarligum flokkum í samgonguni, sigur Eidesgaard.

### Rákið er borgarligt

Jørgen Niclasen, formaður í Fólkaflokkinum segði á landsfundi Fólkafloksins fyri stuttum, at framtíðin er borgarlig, og tað sær út til, at formaður Javnaðarfloksins ikki er heilt ósamdur við hetta.

– Tað sær út til, at rákið í samfelagnum er borgarligt, sigur formaður Javnaðarfloksins.

Jóannes Eidesgaard heldur ikki, at tað loysir nakran trupulleika, at hann leggur frá sær sum formaður.

– Eg trúgvi ikki tað er so einfalt, at allir trupulleikar í Javnaðarflokkinum verða loystir, um formaðurin leggur frá sær, sigur Eidesgaard.

Spurdur um Javnaðarflokkurin framvegis ætlar at samstarva við Fólkaflokkin og Sambandsflokkin, eftir fleiri negativar veljarakanningar, hevur Jóannes Eidesgaard ikki nakran greiðan boðskap.

– Eg kann ikki svara uppá, hvat vit fara at gera, men spurningurin er, hvørjar aðrar møguleikar vit hava, sigur Jóannes Eidesgaard, sum eisini saknar ein vinstra-høgra blokkpolitikk.



hvørjar broytingar talan er um.

Niclasen veit, at flokkurin hevur ikki staðið seg serliga væl seinastu mánaðirnar, og veljararnir tala nú at.

- Tað er kanska eitt álop á meg sum formann. Flokkurin hevur havt samstarvstrupulleikar, og vit vita væl, at støðan hevur ikki verið nøktandi. Fólkaflokkurin stendur seg eisini ofta illa í veljarakanningum, sigur Jørgen Niclasen, sum heldur, at Fólkaflokkurin stendur meira saman sum ein eind nú.

### Løgtingsval nærkast

Løgtingsval verður í seinasta lagi í januar 2012.

Fólkaflokkurin hevur eitt ár at brynja seg til valið.

Jørgen Niclasen hevur brett upp ermar. Fólkaflokkurin skal vinna aftur tey trý til fýra prosentini av samlaðu atkvøðunum, sum flokkurin stendur til at missa, sambært veljarakanningini.

- Flokkurin tolir illa at verða hongdur út. Tað hevur verið rumbul í flokkinum, og stórar avbjóðingar bíða okkum. Vit hava tikið trupulleikarnar til eftirtektar, og vit verða til reiðar til valið, sigur Jørgen Niclasen.

# Fólk velja ríkisfelagsskapin

**Veljarakanningin er hugalig fyri okkum, sum í hesum buldrasligu tíðum sita við róðrið, sigur Kaj Leo Johannesen, løgmaður**

Randi Jacobsen



Framgongdin hjá Sambandsflokkinum í veljarakanningini svarar neyvt til tað, sum Javnaðarflokkurin og Fólkaflokkurin missa.

Kaj Leo Johannesen er fegin um úrslitið, men hann trýr einki uppá, at hetta hevði verið úrslitið, um val var í dag.

- Hetta er bara ein veljarakanning. Tá ið val verður aftur í 2012, fara fleiri veljarar óivað aftur til sín flokk, sigur Kaj Leo Johannesen.

Hann er mest fegin um, at samanlagt er samgongan støðuføst. Samanlagt varðveitir samgongan sínar 20 sessir í løgtinginum.

- Tað sigur, at samgongan hevur gjørt nøkur mál rætt, sigur løgmaður.

Hann tulkar eisini úrslitið sum, at ákærurnar frá andstøðuni ikki hava nortið við hugsanina hjá veljarunum. Veljarin hevur ikki somu áskoðan sum andstøðan.

- Hetta er sera hugaligt fyri okkum, sum í hesum buldrasligu tíðum sita við leiðsluni.

### Fólk velja trygd

Kaj Leo Johannesen ivast ikki í, at veljarin hevur fingið eyguni upp fyri, hvussu góður ríkisfelagsskapurin er fyri Føroyum. Hevði ríkisfelagsskapurin ikki verið, hevði eingin bankapakki kunnað bjargað Føroyum, og so hevði ikki verið gott at búð í Føroyum. Fólk velja ríkisfelagskap og stabilitet, heldur løgmaður.

Samgongan hevur fingið nógvar ákoyrur frá andstøðuni um atgerðarloysi.

### Gjørt nógv

- Hatta er bara retorikkur frá andstøðuni og hevur ikiki hald í veruleikanum. Henda samgongan hevur fingið ótrúliga nógv ígjøgnum hesi tvey árini, sigur Kaj Leo Johannesen. Hann nevnir í tí sambandinum m.a. bankaskipanina, broyttu ALS-skipanina, nýggja eftirlønarskipan, inntøkutrygdina, gransking arparkina, útbyggingina av flogvøllinum, tamda lønarvøsturin hjá tí almenna, og at roknskaparárið fyri 2010 verður betri enn væntað.